DAGSINS MEINING

Vísið varsemi

Aftur standa vit við eitt vegamót. Høvuðsvinnan, fiskivinnan, fær frá fiskivinnuráðgevingini greið boð: veiðan eftir m.a. toski má minkast munandi. Trýstið á toskastovnin er vorðið ov stórt og má skerjast so ella so.

Hetta eru greiðu boðini frá ICES til eitt nú føroyskar myndugleikar. Nú skulu so okkara egnu fiskifrøðingar og ráðgevar hjá landsins myndugleikum meta um tilmælini frá altjóða stovninum ICES, ein stovnur, sum á hvørjum ári kemur við fakligum tilmælum um fiskastovnarnar, veiðutrýst og tilmælda veiðu. Ein stovnur, sum eisini hevur verið fyri hvøssum atfinningum bæði í útlandinum og her heima á klettunum.

Tað er greitt, at okkara fiskimenn og reiðarar og tey, sum vara av fiskivinnuni, ikki uttan víðari vilja góðkenna øll tilmæli, sum koma frá stovnum sum ICES og somuleiðis okkara egnu fólkum, sum arbeiða við stovnsmetingum. Tað er ikki so langt síðani, at tilmælini frá sama stovni vórðu kolldømd av politisku myndugleikunum her heima eitt nú eftir ráðgeving frá kendum íslendskum fiskifrøðingi og ráðgeva. Nú ljóðar so, at hann er komin til Føroya í kjalarvørrinum á nýggjastu ICES-frágreiðingini.

Vit minnast øll, hvussu avgjørdur sami ráðgevi var í fjør, tá hann mælti okkum at síggja heilt burtur frá tilmælunum frá ICES og okkara egnu fiskifrøðingum. Og so bleiv. Man tað fara at vera so í ár eisini kundi verið spurt. Í skrivandi løtu vita vit tað ikki.

Sjálvandi ber tað ikki væl til at skerja veiðuna tvs. dagatalið ógvusliga nógv niður í einum høggi, tí so rillar alt tilverugrundarlagið. Hinvegin ber heldur ikki til bara at ignorera fakliga arbeiði hjá fiskifrøðingum heima og í ICES. Hóast hesi ikki altíð nýtast at siga allan sannleikan, so byggja tey kortini á drúgvar kanningar og metingar. Eins og í øðrum lívsins viðurskiftum ber heldur ikki her til at siga, antin ella. Tað má finnast ein millumvegur, sum tryggjar eina framhaldandi skilagóða veiðu men sum samtíðis eisini gevur ávaringunum og fakligu tilmælunum frá fiskifrøðingunum gætur. Tað, sum oftani verður nevnt "tann gylti millumvegurin". Men kortini eiga vit heldur ikki at brúka henda sum ein regul. Tí er tað so, at toskastovnurin er álvarsliga hóttur, eiga vit eisini at lurta eftir teimum signalunum. Vit eiga ikki at gloyma gongdina út fyri New Foundland, tá toskurin rætt og slætt hvarv av heimskortinum og framvegis ikki er komin fyri seg aftur.

Nú alivinnan er í sorli, nú rækjuveiðan líður, ja nú hesar báðar stoltu og týðandi vinnur nærum eru við at bløða út fækkast beinini búskapurin hevur at standa á. Tí setur tað eisini uppaftur størri krøv til okkum øll um at ansa væl eftir tí ríkidømi, sum er eftir, eitt nú toskinum. Eitt ríkidømi, sum vit hava fingið til láns frá okkara eftirkomarum. Tað skal vera okkara vón, at føroyskir politikarar og myndugleikar lurta eftir ráðunum frá okkara egnu fiskifrøðingum og viga tey væl og virðiliga. Hvørja endaliga loysn teir skulu koma til hava vit onga patentloysn uppá. Men brúkið vit og skil og vísið varsemi.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Misskilta jagstranin í Sjónvarpi Føroya

Í blaðnum leygardagin høvdu vit eina rættleiðing til tíðindini í Degi og Viku mánkvøldið og týskvøldið í síðstu viku. Tá hevði sjónvarpið innslag um, at Sosialurin førdi eina »herferð móti Hermanni Oskarsson«, tí hann á ráðstevnu hjá Norðuratlantsbólkinum á Christiansborg skal hava sagt, at blokkurin er skaðiligur.

Vit filtust á, at sjónvarpið bar rong tíðindi og manipuleraði við Sosialinum hendan dagin. Sjónvarpið misbrúkti yvirskriftina á forsíðuni, sum sjónvarpsmaðurin segði snúgva seg um Hermann Oskarsson. Orðini vóru: »Øsir danir upp móti føroyingum«.

Yvirskriftin vísti til samrøður við løgmann, varaløgmann og fíggjarmálaráðharran, sum allir vístu á, at teir hildu, at Tjóðveldisflokkurin við at flyta føroyskan politikk niður til Danmarkar »øsir danir upp móti føroyingum«. Hetta hevði einki við Hermann Oskarsson at gera!

Eg gjørdi mær eisini tann ómak at ringja til sjónvarpsmannin og vísa á mína misnøgd. Hann gav mær rætt í, at tað helst ikki var rætt at vísa á okkara »matarlepa« og at tað heldur ikki var relevant at vísa myndir av blaðhúsinum hjá Sosialinum – fyri at gera innslagið meira dramatiskt. Hann segði, at hann helt, at vit ikki høvdu gjørt okkara journalistiska arbeiði nóg væl, men at »kritikkurin var noteraður«. Kortini valdi hann aftur at gera sama mistak týskvøldið – aftur at manipulera við forsíðuni hjá Sosialinum, sum einki hevði við málið um Hermann Oskarsson at gera.

Í grein í blaðnum í dag setir Høgni í Jákupstovu, journalistur í Svf, seg sum dómara yvir okkum, og vísir á, at vit ikki gera okkara journalistiska arbeiði til lýtar, og at hann »stendur fast við, at Sosialurin eisini var partur í einari hetz og jagstran av einum almennum persóni, sum varð skyldugur í at hava sagt sína meining í Danmark«.

Lat meg beinanvegin viðganga, at vit ikki eru lýtaleys á Sosialinum – eins væl og eingin annar fjølmiðil er tað. Men tá Høgni í Jákupsstovu fer so langt sum at siga, at vit fremja »karaktermorð«, so fær tað meg at ivast í, hvør tað er, sum setir dagsskránna.

Setningurin hjá Bjarna Djurholm um Hermann Oskarsson átti helst ikki at verið við. Men harfrá at fara at generalisera alt at snúgva seg um hendan persónin, tað er ov langt úti. Hava politikarar úr Javnaðarflokkinum, Sambandsflokkinum og Fólkaflokkinum nú ikki loyvi at kritisera Tjóðveldisflokkin fyri hansara virksemi í Danmark?

Vit hava als ongan áhuga í at leggja eftir Hermanni Oskarson. Tað hevur heldur ongan týdning fyri okkum, um hann er tjóðveldismaður ella okkurt annað.

Men vit góðtaka ikki at verða løgd undir hesa »herferð«, og vit góðtaka heldur ikki at vera orsøkin til skeivan boðskap frá ráðstevnuni hjá Norðuratlantsbólkinum. Vit høvdu fólk á staðnum sum skrivaði frá stevnuni. Okkara fólk hevur so ikki mett, at tann partur in, sum snúði seg um blokkstuðulin og Hermann Oskarsson var tað týdningarmesta, so vit kunnu ikki verða orsøkin til, at so nógv fólk hava fingið hetta skeivt í hálsin.

Orsøkin er kanska at finna hjá fyrireikarunum sjálvum. Í Fregnum valdi skrivarin hjá Norðuratlantsbólkinum í fyrstu útgávu eftir ráðstevnuna við feitum stavum at endurgeva Jørn Astrup Hansen, bankastjóra, fyri at siga, at »Blokkstuðulin er skaðiligur«…

Hesum vísti Jørn Astrup Hansen aftur í blaðnum í gjár.

Tað er harmiligt, at tað er so trupult hjá sjónvarpsmanninum at viðganga, at hann gjørdi eitt mistak. Var talan ikki um eitt mistak, so var tað tilætlað at Sjónvarp Føroya leggur Sosialin undir hesa herferð. So kunnu vit bert staðfesta, at so hevur Høgni í Jákupstovu ein trupulleika.

Eirikur Lindenskov,
blaðstjóri

Kappróðrar-Mál !

Atli S. Justinussen
Árnafjørður

Kappróður, okkara mentanarítrótt, er nú við árunum bara blivin meira og meira harður, og sjálvsagt ótrúliga spennandi, soleiðis at úrslitini eru ótrúliga jøvn, at tað er minni enn eitt sekund millum bátarnar.

Inni á málinum er upptøkutól, so eftirkannast kann, tá javnt er millum bátarnar.

Alt gott um upptøkutól, men tá vit nú liva í einari tøknitíð, hevði tað ikki verið upp á tíðina, at allir bátar fingu eina strikukodu á stavnin, so tá bátarnir komu inn um málstrikuna, har ein fotosella var, blivu skrásettir automatiskt í einari teldu á málinum, so onki ivamál var eftir róðurin.

Innsent tilfar
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen runa@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen
hans@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Hermann Oskarsson hunddálkaður í Sosialinum

Høgni í Jákupsstovu
Journalistur
Sjónvarp Føroya

Blaðstjórin á Sosialinum, Eirikur Lindenskov, hevur fingið ilt í afturpartin, orsakað av at Sjónvarp Føroya vísir á matarlepan hjá blaðnum, saman við matarlepanum hjá hinum størra blaðnum, Dimmalætting. Eirikur Lindenskov sigur, at tað harmar tey á Sosialinum almikið at vera misbrúkt á ein slíkan hátt.

Veruleikin er tíverri tann, at Sosialurin hevur sett allar vanligar journalistiskar leiðreglur til síðis í sínari viðgerð av ráðstevnuni á Christiansborg, tá ið blaðið ókritiskt og uttan á nakran hátt at geva rúmd fyri aftursvari av sera grovum ákærum móti einum óheftum ráðgeva. Tað varð tí at Sosialurin varð nýttur sum myndabakgrund í innslagnum í Degi og Viku um herferðina móti Hermann Oskarssyni.

Hermann Oskarsson er tjóðveldismaður

Á síðu 6 og 7 í Sosialinum hendan dagin eru tríggjar greinar um ráðstevnuna á Christiansborg.

Jóannes Eidesgaard, Bárður Nielsen og Bjarni Djurholm siga sína hugsan um tað, sum fram er farið á Christiansborg. Løgmaður heldur, at Høgni Hoydal øsir danir upp ímóti føroyingum, Bárður Nielsen heldur at Høgni Hoydal roynir at gera tað í Danmark, sum ikki eydnaðist í Føroyum og Bjarni Djurholm heldur, at Føroyingar eru farnir undir skaðiligt virksemi í Danmark.

Tað eru greinarøðir sum hava ein heilt greiðan vinkul - samgongumenn fáa møguleika at siga sína hugsan um tiltakið hjá Tjóðveldisflokkinum í Danmark. At greinarnar í sær sjálvum ikki seta ein einasta kritiskan spurning til teir tríggjar samgongumenninar er sín søk, at blaðmaðurin spyr samgongumenninar um nakrar fyrilestrar sum hvørki hann ella samgongumenninir vita nakað sum helst um, er ein onnur. Men tað er ikki tað ringasta.

Ketan hjá Sosialinum hoppar av álvara av, tá ið Bjarni Djurholm at enda verður siteraður fyri at siga, at ein av høvuðsrøðarunum varð í uppskoti at vera valevni til Tjóðveldisflokkin. Blaðmaðurin hjálpir so lesarunum at upplýsa, at talan er um Hermann Oskarsson. Bjarni Djurholm sleppur at enda greinarøðina á síðunum 6 og 7 við at siga, at so er ikki meira at siga um tað.

Insinuatiónin er heilt greið. Hermann Oskarsson er tjóðveldismaður og tískil fremur hann eisini undirgravandi virksemi í Danmark. Haraftrat verður Hermann Oskarsson knýttur - orsakað av hasari viðmerkingini og upplýsingini frá blaðmanninum - saman við Tjóðveldisflokkin. Herman Oskarsson hjálpir Høgna Hoydal at skapa øsing millum føroyingar og danir og hann roynir eisini at hjálpa Høgna Hoydal at fremja tað í Danmark, sum hann ikki megnaði í Føroyum.

Men hví er Sosialurin trupulleikin og ikki Bjarni Djurholm, sum jú eigur orðini? Orsøkin er ógvuliga einföld. Tá ið Sosialurin letur ein slíkan setning standa totalt einsamallan og tað einasta sum verður gjørt fyri at hjálpa lesaranum ávegis er ein upplýsing um at tað er Hermann Oskarsson, sum Bjarni Djurholm sipar til, so ger Sosialurin setningin hjá Bjarna Djurholm til sannleika.

Men veruleikin er, at hatta er ein grov insinuatión, eitt karaktermorð sum liggur í hasum reglunum. Tað sum verður sagt millum reglurnar, er at Hermann Oskarsson kann ikki nýtast til nakað sum helst, hevur einki trúvirði og tað einasta hann ger er at renna ørindi fyri Tjóðveldisflokkin.

Hvar eru teir kritisku spurningarnir til Bjarna Djurholm?

Nakrir teirra kundu verið:

Hvussu veitst tú at Hermann Oskarsson er tjóðveldismaður?

Um hann varð á listanum veitst tú so, at hann sjálvur bað um at sleppa á listan? (Tað gjørdi hann ikki, eg havi spurt hann, HíJ)

Meinar tú at hann ikki kann brúkast sum formaður í Búskaparráðnum, tí at hann er tjóðveldismaður?

Kanst tú prógva at hann er tjóðveldismaður?

Kanst tú prógva at hann rennir ørindi fyri Tjóðveldisflokkin?

Og so framvegis.

Eirikur Lindenskov sigur, at teir í sama blað lata Hermann Oskarsson koma til orðanna um kæruna frá Føroya Fiskimannafelag.

Gamaní er tað rætt, men blaðið velur ikki at konfrontera Hermann Oskarsson við karaktermorðið, sum Sosialurin letur Bjarna Djurholm fremja á síðu 7. Hermann Oskarsson sleppur ikki at svara uppá grovu ákærurnar frá Bjarna Djurholm.

Ákærur, sum eru so grovar at kundu tær prógvast, SO átti Hermann Oskarsson at farið frá.

At pástanda at Hermann Oskarsson er komin til orðanna er, fyri at siga tað milt, ein hálvur sannleiki. Ja, hann er sloppin at svara uppá kæruna frá FF - men so heldur ikki meira.

Tað at karaktermorð eru so løtt at fremja í Sosialinum er ein háðan móti øllum sunnum journalistikki. Hatta er tabloidjournalistikkur sum hevur eittans endamál og tað er at selja bløð. At so karakterlík fylgja í kjalarvørrinum, tað sær blaðhúsið á Argjum ikki út til at leggja nakað í.

Tað er í stuttum orsøkin til at eg sum journalistur framvegis standi fult og fast við, at Sosialurin eisini varð partur í einari hetz og jagstran av einum almennum persóni, sum varð skyldugur í at hava sagt sína meining í Danmark. Ein persónur, sum má og skal hava møguleika fyri at koma við konstruktivum íkasti til kjakið í Føroyum og í Danmark.

Tað er mikið møguligt at karaktermorðið hjá Bjarna Djurholm einans varð eitt mistak, frá blaðmanninum ella Bjarna Djurholmi sjálvum. Men so er tað Eirikur Lindenskov einsamallur sum situr eftir við ábyrgdini.

Greinin hjá Eirikki Lindenskov eitur "Skeiv endurgeving í Sjónvarpi Føroya." Innslagið í Degi og Viku skuldi kanska heldur itið "Karaktermorðið í Sosialinum."

Samfelagið fyri øll í Føroyum

Hans Birgir Hansen
Biggi samfelagsrevsari úr Havnini

Eg havi nógv atfinningarsemi við gevur úrslit tá ein vísir á teir grundleggjandi skeivleikar, og órættvísi, hvussu samfelagið er innrætta og skipa, í stríð við »Mannarættindar skipanir«.

Tað er einki sum eitur, at tey lóggevandi, dømandi, útinnandi, valdir, fáa hevja lóg og rætt, landaskil, eins fyri allar føroyingar, vísandi til stættarskipan, muni, og tí rikna familjupolitik!

Tað hevur avgerandi týdning, at øll kunnu sýna hvør øðrum ein sømuligan atburð, og læra at kenna, og virðismeta onnur medmenniskju, hvat tey ráðariku, ikki vilja gera í Føroyum!

Fólki innanfyri avgreiðslur, umsitingar, og í tí dagliga samskifti, taka einki fyrilit og hógv, mótvegis egnu viðurskiftiafólkum og medmenniskju, tá valdsmisnýtslan er í hæddini ídag!

Øll medmenniskju hava krav upp á at fáa frið og vera tryggjaði, mótvegis øllum teim frísku, ið ikki hava nóg mikið við at greiða egnu lívsviðurskiftir, og skipa gerandislív í Føroyum.

Lóggávur, skipanir, mannagongdir, kunn- og reglugerðir, innanfyri avgreiðslur, umsitingar, almenna, land, kommunur, ríkið, privata, er ikki tillaga viðurskiftafólki og medmenniskju!

Samfelagið er kavetandi rotið, korrupt, sjúkligt, viðbreki, tá fólkið ikki fær fortreytir, tilverugrundarlagið, eftir egnu førleikaevnum, og vera kunnað um samfelags ábyrgdir og skyldir ídag. Tað er ræðuligt at uppliva samfelagið, ið er fyrilitað, kenslu, samvisku, skyld, ábyrgdarleyst, kalt og kyniskt, úti á øllum støðum, almenningurin, hevur atgongd og úti í øllum náttarlívinum!

Tað skal finnast harðliga at øllum teim frísku, hvussu hesi fara við teim, ið eru øðrvísi uttan fyri stættaskipan, muni og tí rokna familjupolitikki, á almenna og privata arbeiðsmarknaði ídag! Tað er skelkandi at uppliva og síggja hvussu børn, ungdómur, tilkomin, eldra fólki, er broytt tann skeiva vegin av áðurnevndu, ið er høvuðsupprunin til atfinningarsemi í lesarabrøvum!

Tað er fullkomuliga burtur við børn, ung, tilkomin á bústovnum og viðgerðarstovnum, sjúkrahúsum, ellis- og røktarheimum, ið fáa eina ómenniskjaliga røkt og viðgerð eins og djórini fáa!

Eg skrivi alt út frá egnum erfaringum, lívsroyndum, kenslum, meiningar, upplivingar, ið ein fær greitt frá í teim túsundtals lesarabrøvum, ið gevur øllum innlit, forstáilsi, tilvitan í dag!

Eg eri hart ímóti medesinsku viðgerðum og elektroshok og at børn, ung, tilkomin, eldra fólki, verður við tvangshóttanum og skipanum tíkið av ræði í egnum barnaheimi í øllum Føroyum!

Øll ið stuðla og halda hondina yvir slíkum atsóknum geva mær veruliga andstygd í ikki eru frægari enn øll fakfólk, starvsfólki innanfyri ráðandi kreftir skipanir, myndugleikar, valdir!

Einki bussskýli á Oyrarbakka

Jón Ellendersen
Oyrarbakki

Tað kann tykjast eitt sindur løgið, og eisini eitt sindur ábyrgdarleyst, at Oyrarbakki sum ein av teimum fáu bygdunum í Føroyum einki bussskýli hevur, ikki minst tá hugsað verður um, at vit hava ein stóran skúla, har børnini mangan standa í regni, kava, stormi og kulda og bíða eftir bussinum.

Og bíða, tað noyðast øll sum ætla sær við Bussleiðini av Oyrarbakka, tí bæði bussurin úr Leirvík og úr Havn kemur tá tað, so at siga, passar honum. Til tíðina kemur hann so ikki, hvør orsøkin so man vera.

Tað kann ikki vera rætt, at børn og eldri fólk skulu fáa karm omaná karm, standa og frysta í kulda uttan nakran sum helst møguleika at kroka, og næstu ferð bussurin støðgar, um tað so er norðureftir, suðureftir ella út móti Skálafjørðinum, standa øll trygt og gott í bussskýlinum, væl vard móti regni, vindi, kulda og kava.

Eg vóni, at hetta brævið er nóg mikið, tí um stutta tíð letur upp ein nýggjur stovnur, ein barnagarður, vøggustova og frítíðarheim í einum, og tá haldi eg, at tað líkist ongum, at bert tey, sum hava egnan bil, hava tað fullu gleðina av stovninum.

Sjálvandi er onkur orsøk fyri, at vit einki skýli hava, men um tað so bert eitur fyribils, sum er mest útbreidda sjúka í Føroyum, so hava børnini, sum ganga á felagsskúlanum, tey gomlu, sum ætla sær suðureftir ella aðra veðir við bussinum, rætt til eitt skýli.

Við vón um, at tá skúlin byrjar aftur, stendur eitt flunkandi nýtt skýli og bíðar eftir næmingunum.